# Tað er ikki liðugt millum meg



*Heini sær børnini hjá sær fleiri ferðir um árið. – Tað hevur mangan verið hart at siga bei, men tað er ein kunstur, sum bæði børnini og eg duga nógv betur í dag, sigur Heini Ziska Dahl*

*Mynd: Bárður Lydersen*

**– Longsulin er øgiligur. Eg havi tilvitað valt at halda meg langt burtur frá barnatiltøkum í býnum, um míni børn ikki eru heima hjá mær. Eg klári tað slettis ikki, sigur Heini Ziska Dahl, sum fyri fimm árum síðani valdi at flyta aftur til Føroya at búgva, meðan børnini vóru eftir hjá mammuni í Danmark**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Hóast Heini mangan var í iva um sína avgerð at flyta heim, so gjørdi hann nógv fyri ikki at setast afturá og bara søkka í eitt dýpi av sorg og sakni eftir sínum børnum. Hann tykist púra greiður yvir, at tey vóru tvey í hjúnalagnum, og bæði høvdu sín part av skuldini av, at tað ikki gekk.

Hann sigur tó, at tað hava verið løtur, har tað hevði verið lætt bara at givið henni alla skuldina, og so var tað umskylningurin fyri ikki at kunna virka í gerandisdegnum. Men hvør hevði tá verið taparin, spyr Heini.

– Longsulin er øgiligur. Eg havi tilvitað valt at halda meg langt burtur frá barnatiltøkum í býnum, um míni ikki eru heima hjá mær. Eg klári tað slettis ikki. Alt steðgar upp, sigur Heini og fortelur um ein dagin beint fyri jól, tá hann var á veg til hús. Hann kom fram við einum familjutiltaki í býnum, har fult av børnum stóðu og sungu jólasangir.

– Tað var ræðuligt, tí tað ber ikki til at ganga framvið slíkum uttan at hugsa um míni børn, sigur Heini.

Hann hevur tó roynt at síggja tað positiva í longslinum. Tað hevur hann eisini roynt at læra børnini.

– Hugaheimurin er jú eitt stað, har børnum dámar væl at vera, sigur Heini. Hann heldur fram, at tá børnini siga, at teimum leingjast, so plagar hann at biðja tey blunda og vita, um tey ikki síggja pápa sín.

– Mátin at vera saman uppá verður bara øðrvísi, tá vit ikki kunnu síggjast hvønn dag, sigur hann.

---

Fyri átta árum síðani fóru Heini Ziska Dahl og kona hansara frá hvørjum øðrum. Eftir at hava roynt at fáa gerandisdagin og lívið at virka so nøkulunda undir teimum nýggju umstøðunum, gav Heini skarvin yvir og flutti til Føroya, tá konan kravdi fullan foreldramyndugleika og fekk hann.

– Tað var ræðuligt og í langa tíð var alt sinnið hjá mær í kók. Paranoian var øgilig, og eg var fullkomuliga í kolkjallaranum. Men við tíðini lærdi eg at liva við støðuni, og í dag er tað heilt gott – eisini fyri børnini, sigur Heini, sum sær børn síni fleiri ferðir um árið.

Hann býr og arbeiðir í Klaksvík, meðan børnini búgva og ganga í skúla í Hillerød. Tey tosa tó so ofta saman í telefonini sum til ber, og sambandið millum pápa og børn tykist ikki at líða so nógv undir avstandinum, sum kanska hugsast kundi, heldur Heini sjálvur.

– Sjálvandi kundi eg hugsað mær at verið við til at hjálpt teimum at gera skúlating, at fáa tey í skúla og vera ein partur av gerandisdegnum, men umstøðurnar loyva tí ikki, so tá

> ” *– Eg eri ikki komin so langt, at eg kann respektera hennara avgerð um at krevja fullan foreldramyndugleika. So menniskjasligur eri eg nú heldur ikki*



*– Vit hava lært okkum at síggja tað positiva í longslinum. Tá børnunum leingist illa, plagi eg at tosa við tey*